sosialurin telf. 14720. 11820
box 76, 3800 Tórshavn
Útgevari: p/f sosialurin
Fyritaks- og blaðstjóri: Tórfinn Smith (ábyrgd)
Blaðmenn: Høgni Djurhuus
Jóhann Mortensen
Jan Müller
Lysingar: Arni Joensen
Uppseting: Sosialurin
Prent: Dimmalætting

Tað er bara so

TAÐ undrar ikki okkum, men sær sjálvari lík leggur Dimmalætting í oddagrein á gomlum donskum týsdagin eftir Javnaðarflokkinum, tí hann tilletur sær at gera viðmerkingar um sitandi landsstýri og tess evnaloysi. Og kemur sambandsurgan síðan við slitnu propagandaplátu síni um hvussu stutt hetta stýrið hevur sitið og illanokk hevur havt stundir til at finna pláss fyri lagkøku- og túsundbeinastýrinum í Tinganes.

SÍÐAN fær Javnaðarflokkurin vanligu floyngjuna um at fráfarna stýrið við løgmanni sínum yvirhøvur einki annað hevur gjørt øll árini uttan at hava ført landið út á tromina á húsagangi.

TAÐ er í sær sjálvum nógv fyri at skula svara slíkari burturúr vón og viti høpisleysari skriving. Harmiligari er at fólk fyri ein part lesir hesar oddagreinir í álvara, greinir, sum skrivaðar eru av fólki, sum í veruleikanum einans hava til endamáls at skriva nakað, sjáldan í álvara, men meira við tí fyri eyga, gagnar tað okkum, so er ivaleyst, um tað so er í beinleiðis goebbelskum stíli, leggur vertini í.

VIÐ einum slíkum framferðarhátti sum Sambandsfloksins urga leggur fyri ein dag, kunnu vit lítið annað vænta av sitandi stýri enn øktar byrðar til skattaborgaran og lítla og onga framgongd í samfelagnum, heldur hin vegin. Tí vit fingu týðuliga at vita á ólavsøku, at sitandi landsstýrið yvirhøvur onga trúgv hevur upp á hetta samfelag. Nøkur menning verður neyvan, alt tað sum bygt var upp í sjeytiárunum skal niðursjóðast, og tey megnarframstig, sum við vit sóu, verða so hvørt kvørkraði, so títt og knapt tað fellur í tráð við onkran av vinum og kenningum hjá sitandi stýri.

EFTIR STUTTARI tíð hevur Sambandsflokkurin megna at niðurbróta tað álit, sum Føroyar høvdu fingið úteftir á flestum økjum.

SO SYRGILIGT er tað bara.

Floksparolan

viðmerkingar

Undir heitinum viðmerkingar hevur Sosialurin oftast latið t.d. ein av tingmonnunum skriva sína hugsan um samfelagsviðurskifti, politiskar spurningar. At teir eisini verða mettir at vera floksins, man helst oftast vera rætt. Men eftir spurninginum í Sosialinum mikudagin at døma, er tað fallið onkrum lesara fyri bróstið, at tingmaður kann hava eina meining, sína hugsan sum kanska ikki akkurát er hin ráðandi flokshugsanin — undir teignum viðmerkingar.

Eftir spurninginum at døma eigur ein tingmaður helst ikki at siga ella skriva annað enn tað sum frammanundan er góðtikið sum floksparola í blaðnum. Ein fekk líkasum hesa hugsan við at skeita yvir á næstu síðu blaðsins, har sera rúgvumikil »yvirlýsing« var at síggja frá Framamonnum, hvør skal siga, ein ábending um at halda paroluna til einhvørja tíð!

Tað átti at verið sjálvsagt, at floksins umboð søgdu sína hugsan — eisini um meiningarnar ikki eru beint eftir floksreseptini frá landsfundinum. Ella er tað so at floksvaldu umboðini bara hava okkurt at siga 4 hvørt ár — mestsum?

Vit kundu onkutið hugsa okkum at frætt frá býráðslimum okkara í Havn, t.d. hví tað ikki kann lata seg gera at fáa Havnará á strekkinum gjøgnum plantasjuna at vera eina reina á, so sum tit fyri nøkrum árum síðan greiddu frá á fundi í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag. Áin er stoðugt ein stinkandi kloak.

Tað hevði verið áhugavert um okkurt tílíkt eisini frættist.

Men høvdu floksins umboð altíð verið so tigandi, sum tey eru í dag, so hevði flokkurin ongantíð verið stórur, men eins lítil sum teir bólkar, sum eitt nú koma við »Yvirlýsingum« longum og mótsigandi, so longum at heldur ikki blaðmenninir á Sosialinum tíma ella orka at geva lesarum sínum ein samandrátt — so lesarin fekk fatur í hvat Framamenn í og fyri seg høvdu at siga.

J. Lindenskov

Skattagjalding og ferðing

Tá ið eg tók seinasta Tingakross upp í hendurnar, læs eg á fyrstu síðu um skattaeftirstøðurnar. Har sæst, at eftirstøðurnar ár undan ári bert vaksa. Tað eru tey, sum av eini hvørjari orsøk ikki kunnu rinda skatt sín. Tað kann vera sjúka, vánaligt útróðrarveður o.a.t. Tað er fyrigeviligt.

Men hvussu við skattaeftirstøðunum sum heild? Munnu tær ikki í nógvum førum koma av ógvuliga lágum morali. Eru tey ikki ímillum, sum vilja vera í samfelagsins fremstu røð, sum skylda? Uttan ivað.

Av yvirlitinum sæst, at fimtaparturin av álíknaða skattinum fyri seinasta skattaár ikki er inngoldin. Nú skal eg ikki geva meg út fyri at vera hagfrøðing, men tað er áleið fimti hvør skattagjaldari! Men tað løgna er, at líkamikið hvar tú ert og tosað verður um skatt, so er tað altíð hini sum skylda! Ongantíð tey tú tosar við. Tú situr í hugnaligari samveru við nógv fólk, og tá ið práta verður um skatt, og tú skymast runt, so sært tú tey vakrastu dúgveugu ið hugsast kunnu.

Tá ið hetta landsstýri tók við, høvdu nógv fólk rokna við eini betri upptøku, hvat skattaeftirstøðunum viðvíkur. Men so er ikki, tíðanverri. Eftir løgmansrøðuni á ólavsøku at døma, skal sama tógv verða á snælduni sum áður. Sami jánkasligi skattapolitikkurin sum undanfarna landsstýri!

Men rætt skal verða rætt. Tað gongur framá við at fáa kelduskattaskipanina í lag. Men hvussu tá við teimum eftirstøðunum sum tá verða? Eg tori ið hvussu so er, at leggja høvdið á blokkin fyri, at øll sum tá skylda skatt, sleppa undan at gjalda hvørt eitt einasta oyra!

Nú vil onkur halda at eg gangi onkrum ov nær. Men, man tað verða. Munnu tey sum ikki gjalda, ganga okkum sum gjalda ov nær? Tað man heldur verða.

Men til seinra partin av yvirskriftini, ferðingin uttan lands hjá føroyingum.

Ferðasambandið er gott, bæði sjóvegis og loftvegis. Ikki bert inn á meginlandið, men eisini beinleiðis til Mallorca. Og nógv ferðast. Við sær hava ferðafólkini hópin av peningi. Tað mugu tey um, men munnu ikki ímillum hesi fólkini vera tey sum skylda skatt. Og skuldi tað ikki verið eitt krav frá landsmyndugleikunum at fólk sum fara burtur í onnur lond at stuttleika sær, fyrst og fremst avgreiddu sína samfelagsskyldu, áðrenn tey fóru! Tað skuldi verið tað minsta.

Sjúrður Samuelsen

tjak og meiningar


Vit gera lesarar okkara varugar við, at treytin fyri at fáa lesarabrøv upptikin undir hesum teiginum er, at blaðstjórnin veit, hvør hevur skrivað brøvini.

filmarfilmarfilmarfilmarfil

Jean-Paul Belmonde, tá hann er bestur. Hann er í hesum filminum ein løgreglumaður, sum skal rudda upp millum mafiabossar og aðrar slíkar. Fyri at greiða hetta, gevur Belmonde seg út fyri at vera brotsmaður av ti snildara slagnum. Snildur er hann so í øllum førum og hann fær fleiri og fleiri av teimum veruligu brotsmonnunum sjálvar at avdúka seg. Men hann fær eisini stundir at fara við konufólki millum tey nógvu slágsmálini.

Leikhús Bio.





I fyrstani var ætlanin, at John Travolta skuldi hava høvuðsleiklutin í filminum American Gigolo. Men hetta bleiv í seinastu løtu broytt og Richard Gere kom í staðin.

Paul Schrader, sum eisini hevur gjørt tann væl umtókta filmin Taxi Driver, hevur hesaferð gjørt ein film um ein ungan mann, sum starvast sum tolkur, ferðaleiðari og bilstjóri hjá ríkum kvinnum. Hetta er arbeiðið, hann fær sína løn fyri. Men hann ger eisini annað og meira fyri hesar yvirstættarkvinnurnar. Hann er teirra elskari.

Soleiðis fær hann dagarnar at ganga. Í sínum svarta Mercedes koyrir hann frá einari kvinnu til eina aðra og honum dámar væl hetta livið.

Men so ein dagin verður hann, uttan tó sjálvur at vilja tað, góður við eina senatorfrúu. Hann verður skakaður, nú kenslurnar knappliga fara at gera vart við seg. Tað er fyrstu ferð.

Men samstundis fær løgreglan grun um, at tað er hann, sum hevur myrt konu ein ríkan iðnaðarmann í Palm Beach. Onkur hevur lagt nakrar gimsteinar, sum tann myrda kvinnan átti, í bil hansara. Onkur ætlar at fáa hann dømdan fyri morðið. Men hvør?

American Gigolo gongur í Havnar Bio.